# Hiti er náttúruvinarligur

Jákup Hanusson, Aki Mortensen og Suni Danielsen byrjaðu fyritøkuna í 2005. Byrjað var við sølu av vanligum húsarhaldsketlum, oljufýrum og brennarum og saðlað var so um, eftir at eyguni vórðu opnaði fyri alternativari orku. Euronom í Svørki hevði sent ein sølumann til Føroya, og tá Olaf Vesturgarð kom afturat ungu fyritøkuni, kom verulig gongd á søluna av tólum til alternativa orku. Vit tosa um Hitapumpur, og er tað svenska fyritøkan Euronom, ið Hiti umboðar í Føroyum. Svenska fyritøkan byrjaði framleiðsluna í 1977, og hevur arbeitt við at gera pumpurnar serliga væl egnaðar í norðurlendskum klima. Hóast Hiti enn bert er ein ung fyritøka, vóru teir fyrstir at selja hitapumpur í Føroyum, og er tað einamest luft-vatn pumpurnar, ið verða seldar. Tað finnast onnur sløg av hitapumpum, men einamest er tað luft-vatn pumpurnar, ið selja. Hóast tað er heilt niður í 25 kuldastig, kann pumpan hita vatn upp til 60 hitastig. Eftirspurningurin er sera stórur, og arbeiðir fyritøkan miðvíst við at nøkta alla umvæling og viðlíkahald sjálv, við at specialisera starvfólk sítt til tað gjøgnum skeiðir og eftirútbúgvingar.




























